


ALT HEVUR EIN PRÍS!

# Páskastevnan 2004

## í Ítróttarhøllini á Hálsi 8.-12. apríl

**Skírishósdagur**
Kl. 18.00 Møti við Eivind/David

**Langi Fríggjadagur**
Kl. 10.00 Morgunmøti
Kl. 18.00 Møti við Eivind/David
Kl. 22.00 Teenagekvøld "After Eight" skipar fyri

**Leygardagur**
Kl. 19.00 Møti við Eivind/David
Kl. 22.00 Lovsangskvøld við Rudi Myntvik

**Páskadagur**
Kl. 10.00 Morgunmøti
Kl. 15.00 Barnamøti, sunnudagsskúlin skipar fyri
Kl. 18.00 Møti við Eivind/David
Kl. 22.00 Sangkvøld við Magna Christiansen, systrarnar í Evangeliihúsinum og Heina Lützen

**Annar Páskadagur**
Kl. 10.00 Morgunmøti
Kl. 18.00 Møti við Eivind/David

**Øll eru hjartaliga vælkomin!**

# Maskinmeistari

**søkist til**
**Elfelagið SEV**

Eitt starv sum maskinmeistari á Sundsverkinum við skyldu at avloysa ein part av árinum á Fossáverkinum í Vestmanna, um tað verður álagt seinni, er leyst at søkja til setan frá umleið apríl/mai 2004.

**Starvið:**
Sundsverkið hevur 5 dieselmotrar upp á tilsamans 46,7 MW. Brennievnið er tungolja.

Maskinmeistaraarbeiðið umfatar rakstur og hald av Sundsverkinum, bæði sum dagarbeiði og sum vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Uttanfyri vanliga arbeiðstíð eru altíð tveir maskinmeistarar á vakt á Sundsverkinum.

Tann, sum settur verður í starvið, skal, við at taka við starvinum, góðtaka seinni møguliga at fáa álagt at arbeiða á Fossáverkinum í Vestmanna ein part av árinum sum vaktgangandi avloysari, serstakliga í summarhálvárinum.

Undir Fossáverkinum hoyra eisini Mýru-, Heyga- og Eiðisverkið, sum eins og vatnturbinan á Strond verða stýrd frá Fossáverkinum. Talan er um tilsamans 7 vatnturbinuaggregat við einum samlaðum mátti upp á 28,4 MW. Harafturat stýrir vakthavandi á Fossáverkinum býtið av framleiðsluni millum elverkini í meginøkinum, herundir eisini Sundsverkið og Strond (lastfordeiling). Eisini er vakthavandi á Fossáverkinum koblingsleiðari fyri háspenningsanleggini í meginøkinum.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at umsøkjararnir hava fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært 4. lønarflokk eftir sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan.

Byrjunar- og endalønin í 4. lønarflokki verður frá 1. mars 2004 netto ávikavist kr. 22.106,48 og kr. 23.798,31 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávikavist kr. 2.763,31 og kr. 2.974,79 um mánaðin.

Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.

Fær viðkomandi seinni álagt omanfyri nevnda arbeiði á Fossáverkinum fyri styttri ella longri tíðarskeið, verður viðkomandi fluttur upp í 5. lønarflokk sambært lønarsáttmálanum millum SEV og Maskin-meistarafelagið fyri ta tíðina.

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum verða send Elfelagnum SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 3. mai 2004.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Osvald Hansen, verksmeistara á Sundsverkinum ella til Bjarka Hermansen, deildarleiðara á Maskindeildini, báðir á telefon nr. 346800.

Tórshavn, tann 5. apríl 2004.

**Elfelagið SEV**

Postboks 319, 110 Tórshavn
Teloefon (0298) 311366
Telefax (+298) 310366, E-mail sev@sev.fo

W W W . S O S I A L U R I N . F O



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3753
Navn: Sp/f 4. oktobur 1980
Adressa: á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 18.02.2004
Viðtøkudato: 18.02.2004
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: P/F 17. november 1979, 100 Tórshavn (P/F 267).
Stjórn: Ann-Mary á Rógvi Rasmussen, Undir Glaðsheyggi 6, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: Sp/f Jóannes Skorheim, Heygavegur 62, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.02. - 31.01.
Fyrsta roknskaparár: 18.02.2004 - 31.01.2005
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 5. apríl 2004

Kristin Balle

www.sosialurin.fo

## Fráboðan um loyvi til aftursøkking

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 6. apríl 2004, við heimild í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum, hevur givið **P/F J & K Petersen** loyvi til aftursøkking av tilfari:

**í Kalsoyarfirði,**
**á knattstøðu 62° 15' N og 06° 39' W,**
**út fyri Syðradali**

Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Loyvi liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Loyvi kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

# Kunngerð

**um møguligar broytingar í bygdarskipanini fyri Vestmanna Kommunu**

Við heimild í løgtingslóg nr. 13. frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verða møguligar broytingar í bygdarskipanini lagdar fram til alment eftirlit.

**Møguligu broytingarnar umfata:**

- víðkan av ídnaðarøkinum Inni á Fjørð. Ætlaða broytingin umfatar matr. nr. 216a og litra »b«.
- broyting av havnaøki Inni á Fjørð. Ætlandi skal partur av havnaøkinum broytast til øki til almennar stovnar. Ætlaða broytingin umfatar part av matr. nr. 216n.
- broyting av miðstaðarøki og frílendi í Miðalsbrekku. Ætlandi skulu miðstaðarøki og frílendi broytast til øki til almennar stovnar. Ætlaða broytingin umfatar matr. nr. 282a, 282ao og 282az.

Kort og onnur skjøl viðvíkjandi møguligu broytingunum liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni

**í vanligari skrivstovutíð frá 13. apríl til 4. mai 2004 – báðir dagar íroknaðir.**

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, skulu vera Bygdarráðnum í hendi í seinasta lagi 13. juli 2004.

**Vestmanna Bygdarráð**

# Sethúsini Traðagøta 47 til sølu



Um hóskandi boð fæst, eru eini sethús á Argjum við góðum útsýni til sølu.
Grundøki er uml. 500 fermetrar.
Húsini eru í trimum hæddum, miðhædd og kjallarahædd uml. 100 fermetrar og loftið uml. 35 fermetrar.
Kjallaraíbúð: Stova/køkur, tvey kømur, baðirúm og gongd.
Á miðhæddini eru tvær stovur, køkur, baðirúm, kamar og hjúnarúm.
Á loftinum eru tvey kømur og gongd
Byggiár: 1973.

Áhugað kunnu ringja tel. 317087 eftir kl.17.00

# Alzheimerfelagið

**hevur aðalfund**
**tann 25.apríl í Læraraskúlahøllini**

Skrá samb.løgum felagsins.

Mál til viðgerðar á fundinum skulu sambært viðtøkum felagsins verða nevndini í hendi í seinasta lagi 8 dagar fyri fundin.

**Nevndin**

WWW.SMYRIL-LINE.COM



# Innkeypsleiðari til Smyril Line

## Søkt verður eftir innkeypsleiðara til Smyril Line

Starvið umfatar alt innkeyp til felagið.

Viðkomandi skal hava útbúgving og royndir innan keyp og sølu í handilslívinum, skal hava góðan teldukunnleika, duga enskt í skrift og talu.

Hava góð samstarvs- og samráðingarevni.

Løn sambært avtalu.

Umsókn við prógvum og upplýsingum um royndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 13. apríl 2004 og skulu stílast til:

*Smyril Line*
*Stjórnin*
*Postsmoga 370*
*110 Tórshavn*

J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo

# VW Golf 2,8



V6, 182 HK, 6,8 sek. til 100 km.
18" sportsfelgur, 17" sportsfelgur á píkadekkum.
Anlegg við subwoofara og forsterkara. Sóltak.
Til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Ring 25 82 41**

# Íbúð ella hús ynskist

Vegna eitt av starvsfólkum okkara søkja vit eftir íbúð ella húsi í Tórshavn ella nærhendis skjótast gjørligt.

Vinarliga setið tykkum í samband við

**P/F Meinhardt Arge**
**Tlf. 345400**

# Aðalfundurin hjá FNU

**verður 25. apríl kl. 16.00 á Bládýpi**

Skrá sambært løgum felagsins.

**Føroya Náttúru- og umhvørvisfelag**

# Sálarfrøðingur

- havi latið upp viðgerðarstovu
- arbeiði innan sjúkrakassasáttmála um endurgjald við ávísing frá lækna
- eri at hitta gerandisdagar millum kl. 08-09 á tlf. **31 03 35**

**Kári Leivsson**
**autoriseraður kliniskur sálarfrøðingur**
Hoyvíksvegur 65
boks 3134 · 110 Tórshavn